# Viðskiftatreytir á Ver



FØROYA TELE

# 1. Avtalan

Hesar viðskiftatreytir (hereftir Ver-viðskiftatreytir) eru galdandi fyri avtalur um hald v.m. gjørdar um veitan og rakstur av øllum tele- og datatænastum (hereftir tænastur) millum teg sum kunda og Ver, sum er sjálvstøðug tænastueind hjá Føroya Tele.

Hvør myndigur persónur yvir 18 ár, og hvør løgfrøðiligur persónur kann stovna hald sum kundi. Sum kundi hevur tú skyldu til at halda Ver-viðskiftatreytirnar.

Tað er stovnarin av Ver-kontuni, sum hevur ognarrætt til upplýsingar, ið eru knýttar at øllum haldum undir somu Ver-kontu. Sum eigari av Ver-kontuni heftir tú fyri gjaldið av øllum veitingum og møguligum øðrum ískoytishaldum, sum verða veitt í sambandi við avtaluna.

Hetta er somuleiðis galdandi í teimum førum, har tú hevur loyvt øðrum at brúka haldið/ tænasturnar.

**1.1 Talgilt samskifti**

Tað er fortreyt fyri stovnan av haldi, at tú hevur teldupostbústað. Um teknisk ella onnur viðurskifti broytast, kann Føroya Tele krevja, at aðrar fortreytir eisini skulu verða til staðar fyri, at tú kanst stovna hald.

Boð frá Føroya Tele viðvíkjandi avtaluni verða send sum teldupostur til teldupostabústaðin, sum tú hevur upplýst. Boðini kunnu eitt nú innihalda ordraváttanir og kunning um avtalur; herundir fráboðanir um broyting í prísum og treytum.

Tú fært sostatt ikki boðini sum vanligt bræv. Boð, sum tú fært sum teldupost til upplýsta teldupostbústaðin, hava sama løgfrøðiliga virknað, sum vórðu tey móttikin sum vanligt bræv. Tú hevur tí skyldu til javnan at kanna, um boð frá Ver eru komin á upplýsta teldupostbústaðin. Um tú broytir teldupostabústað, skalt tú geva Føroya Tele boð um hetta sum skjótast umvegis sjálvgreiðsluna á www.ft.fo/ver.

Ber ikki til hjá Føroya Tele at senda boð til upplýsta teldupostbústaðin, tilskilar Føroya Tele sær rætt til at krevja eitt avgreiðslugjald at senda tær boðini sum vanligt bræv.

**1.2 Skráseting og rætting av bústaðarupplýsingum:**

Sum kundi skalt tú, tá ið avtala verður gjørd, upplýsa Føroya Tele um navn, føðidato, bústað og teldupostbústað.

Tað er treyt, tá ið tú gert avtalu við Føroya Tele, at tú og allir brúkarar, sum vara av haldum, ið eru knýtt at tínum haldi, hava sama og fastan bústað í Føroyum, og at Føroya Tele fær upplýsingar um navn, føðidato, bústað og teldupostbúðstaðin hjá øllum brúkarum, sum vara av haldum, ið eru knýtt at tínum haldi.

Tú skalt, um Føroya Tele metir tað neyðugt, prógva rættleikan í upplýsingunum. Føroya Tele kann tí krevja løgváttan við mynd, um tað verður mett neyðugt. Hareftir eru upplýsingarnar grundarlag undir avtaluni, inntil broytingar verða fráboðaðar.

Føroya Tele tilskilar sær rætt til at nýta kundaupplýsingar tvørtur um tænastueindirnar hjá Føroya Tele P/F og øllum feløgum í Føroya Tele-samtakinum við tí endamáli at tryggja rættar upplýsingar á øllum tænastueindum, sum eru knýttar at Føroya Tele P/F.

Kundaupplýsingar verða tó ikki veittar øðrum uttan lógartryggjað endamál. Tú kanst lesa meira um persónsdátapolitikkin hjá Føroya Tele á www.ft.fo

## 2. Stovnan

Hald av tænastu verður bílagt á heimasíðuni hjá Føroya Tele ella á annan hátt, sum Føroya Tele ger av. Við bílegging verður m.a. skilað til, hvørja tænastu bíleggingin fevnir um; herundir hald av eykatænastum v.m.

Ert tú sum kundi í eftirstøðu hjá Føroya Tele við øðrum haldi, skal gamla skuldin rindast, áðrenn nýtt hald verður stovnað. Við stovnan rindar tú fult gjald fyri hald og tænastur, sama um eitt ella fleiri hald eru knýtt at tær sum kunda.

Føroya Tele avgerð, um hesi gjøld skulu rindast frammanundan, afturút ella lutfalsliga. Ver tilskilar sær rætt til at broyta hesa áseting til fyrimun fyri teg sum kunda uttan ávaring.

## 3. Avhending av haldi

Tú kanst bert avhenda haldið til annan, um Føroya Tele gevur sítt samtykki til tess. Føroya Tele kann, sum treyt fyri avhendingina, krevja, at tú og nýggi kundin skrivliga vátta avhendingina.

## 4. Skyldur partanna millum

Tá ið avtala verður gjørd, hava báðir partar skyldu at halda seg til ávísur skyldur.

**4.1 Skyldur hjá Føroya Tele:**

1: At veita tænastu á dygdarliga høgum stigi. Kravið til dygd fevnir m.a. um:

- Stutta útveganartíð, tá ið bílagt verður
- Stutta tíð at fáa samband
- Fáar miseydnaðar royndir at knýta samband
- Góðar hoyri- og flutningsmøguleikar
- Fá brek við tænastuni
- Skjótleika at bøta brek á egnari útgerð
- Neyva skuldskriving av gjøldum fyri veittar tænastur

2: At tryggja, at yvirlit yvir nummarið hjá tær kemur í teldutøka skrá. Tú verður tikin ókeypis við í yvirlitið við navni, starvi/bústaði og telefonnummari uttan so, at tú boðar frá, at tú ikki vilt hesa tænastu. Móti samsýning kanst tú harafturat fáa aðrar upplýsingar á sona.fo, so sum teldupostbústað, heimasíðu v.m.

3: At tryggja, at tú ókeypis hevur atgongd til at ringja til almennu alarmtænastuna 112.

4: At boða tær frá í góðari tíð, um avgerð verður tikin um at broyta títt telefonnummar av tøkniligum ella rakstrarligum ávum.

5: At tryggja, at leigað útgerð er dagførd og uttan brek, tá ið hon verður útflýggjað. Eisini áliggur tað Føroya Tele at tryggja, at útgerð, ið tørvar dagføringar, verður dagførd. Hetta ber í sær, at Føroya Tele hevur rættindi at umsita hesa útgerð. Hetta merkir, at Føroya Tele kann tillaga útgerðina til tørvin hjá einstaka kundanum, dagføra og rætta møguligar feilir á útgerðini v.m.

### 4.2 Skyldur hjá tær sum kunda fevna um at:

- Geva rættar upplýsingar til Føroya Tele í sambandi við stovnan ella broyting av haldi.
- Gjalda fyri tær tænastur, sum Føroya Tele veitir samsvarandi við gjaldstreytirnar. Gjaldsskyldan fevnir eisini um, at onnur hava nýtt tænastuna, herundir óviðkomandi, uttan so, at ósketni hjá Føroya Tele er orsøk til óviðkomandi nýtsluna.
- Lata vera við at nýta haldið sum vinnuligt hald.
- Geva Føroya Tele atgongd til á innleggingarstaðnum at leita eftir og bøta um brek, sum Føroya Tele metir er við útgerðini, og sum ger ella kann gera ólag í fjarskiftiskervið og tænastuna hjá Føroya Tele.
- Bróta av sambandið millum fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele og innanhýsis kervið, um hetta gevur ólag ella er til bága fyri fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele
- Gera vart við kvittan í seinasta lagi 5 gerandisdagar eftir móttøku av sms-kvittan, um tú metir, at okkurt er skeivt við kvittanini.
- Tryggja, at neyðug loyvi eru fingin til nýtslu av upphavsrættavardum verkum, m.a. í sambandi við niðurtøku og/ella útbreiðslu.
- At tryggja, at leigað útgerð verður hildin í góðum og nýtiligum standi. Misheldur kundin hesa skyldu, hevur Føroya Tele rætt til at krevja endurgjald fyri útgerðina. Endurgjaldið verður roknað í mun til vavið av skaðanum.

### 4.2.1 Tað liggur á tær sum kunda ikki at:

- Gera inntriv í innleggingina og útgerðina hjá Føroya Tele.
- Knýta ólógligan fjarskiftisútbúnað í kervisendan.
- Nýta sambandið til fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele á ein slíkan hátt, at tað elvir til skaða ella órógv á fjarskiftiskervið.
- Nýta tænastuna til at gera tarn, ella særandi, ósiðilig ella ólóglig ørindi.

## 5. Útgerð

Øll vanlig útgerð, ið lýkur myndugleikakrøv so sum CE-merking, kann nýtast. Gev gætur, at elvir útgerð, sum ikki er góðkend, til órógv á fjarskiftiskervinum, kanst tú verða kravd/ur eftir endurgjaldi. Nýtsla av tænastunum hjá Føroya Tele er treytað av, at útgerðin stuðlar undir neyðuga tøkni, og at tænastan er sett rætt upp á útgerðini.

### 5.1 Umbýti av leigaðari útgerð

Eru trupulleikar við leigaðu útgerð, kann kundin lata útgerðina inn aftur til kanningar hjá Føroya Tele. Er útgerðin í ólagi orsaka av feili, fær kundin nýggja útgerð útflýggjað.

Er útgerðin í ólagi orsaka av misrøkt, kann kundi fáa nýggja útgerð útflýggjað móti gjaldi. Vil kundin ikki hava nýggja útgerð, men at uppsiga leiguavtaluna, áliggur tað kundanum at rinda møguligt restgjald fyri útgerðina.

Riggar útgerðin, sum hon skal, men kundin vil skifta útgerð í úrtíð, kann hetta gerast mótvegis einum eingangsgjaldi.

### 5.2 Livitíð av leigaðari útgerð

Útgerð, sum er leigað út til kundar, skal vera nútímanshóskandi. Livitíðin er ymisk alt eftir, hvat fyri útgerð talan er um.

**5.3. Rættindi**
Føroya Tele varðveitir ognarrættin til leigaðu útgerðina gjøgnum alt sáttmálatíðarskeiðið. Tað er ikki loyvi at víðariselja ella leiga útgerðina út til onnur. Verður avtalan misshildin, ella misheldur kundin sínar skyldur, kann Føroya Tele til eina og hvørja tíð uppsiga leiguavtaluna og krevja, at útgerðin verður latin aftur til Føroya Tele.

Kundin skal gjalda allar meirútreiðslur, ið kunnu standast av hesum. Somuleiðis kann kundin uppsiga leigusáttmálan uttan uppsagnartíð, um Føroya Tele misheldur sínar skyldur munandi.

# 6. Talgild sjálvgreiðsla

Tá ið tú fyrstu ferð stovnar Ver-kontu hjá Føroya Tele, stovnar tú teg eisini sum kontueigara á talgildu sjálvgreiðsluni á heimasíðuni www.ft.fo. Sjálvgreiðslan gevur eitt nú atgongd til hesar møguleikar:

- Yvirlit yvir tína nýtslu
- Yvirlit yvir tínar rokningar
- Skift av SIM-korti og yvirlit yvir PIN- og PUK-kotu
- Broyting/rættan av persónligum upplýsingum
- Keyp/broyting av haldum og tænastum

Sum kontueigari kanst tú geva fyrisitingarrættindi til kontuna til annan persón, ið hareftir fær rættindi til eitt nú at keypa ella broyta hald, ið eru knýtt at kontuni. Sum kontueigari hevur tú ábyrgd av øllum keypum ella broytingum, ið fyrisitarin fremur á kontuni.

Gloymir tú upprunaliga loyniorðið til sjálvgreiðsluna, kann Føroya Tele senda tær nýtt loyniorð við telduposti til upplýstu teldupostabústaðin hjá tær. Keypir tú tænastur á sjálvgreiðsluna, sendir Føroya Tele eina SMS-kvittan upp á keypið, umframt at tú sært kvittanina í sjálvgreiðsluni.

# 7. Prísir

Føroya Tele kann hækka prísirnar á tænastunum við at boða frá í minsta lagi ein mánað frammanundan. Fráboðan um príshækking verður kunngjørd tær annaðhvørt við telduposti ella í føroyskum fjølmiðlum.

Príslækkingar kunnu setast í verk uttan fráboðan. Føroya Tele kann við telduposti ella sms senda tær uppskot til broyting av haldi ella tænastum, grundað á tína nýtslu.

# 8. Gjaldstreytir

Hesar gjaldstreytir eru galdandi fyri allar tænastur, sum Føroya Tele veitir tær. Tað er fortreyt fyri keyp av Ver-tænastum frá Føroya Tele, at tú teknar gjaldsavtalu við gjaldkorti ella við Mínrokning.

Gjaldsavtalan tryggjar, at tú kanst avgreiða tíni gjøld til Føroya Tele um internetið ella annan gjaldsmiðil, ið Føroya Tele samstarvar við. Føroya Tele hevur rætt til at krevja hóskandi veð, tá ið bílagt verður ella seinni.

**8.1 Trygd**
Gjaldkort- og kontuupplýsingar verða handfarnar í tryggum umhvørvi. Gjaldkort- og kontuupplýsingar eru ikki í varðveitslu hjá Føroya Tele, men hjá okkara undirveitarum Nets ella Elektron. Gjaldkort- og kontuavtalan kann bert nýtast av Føroya Tele.

### 8.2 Mánaðargjald
Fortreyt fyri at hava Ver-hald hjá Føroya Tele er, at tú teknar eina gjaldsavtalu við gjaldkorti ella við Mínrokning. Avtalan tryggjar, at gjaldið fyri títt Ver-hald sjálvvirkandi verður trekt av gjaldkortinum ella av tínari kontu mánaðarliga.

Føst mánaðarlig gjøld fyri Ver-hald verða rindað framman undan við gjaldskortinum ella avtaluna við Mínrokning. Hevur tú fleiri Ver-hald, verða flytingar gjørdar fyri hvørt haldið sær.

Verða fleiri hald knýtt saman, verður ein flyting gjørd fyri haldini, ið eru knýtt saman, ella á annan hátt, sum Føroya Tele ger av. Miðað verður eftir, at sjálvvirkandi flytingin verður flutt í byrjanini av hvørjum mánað. Yvirlit yvir mánaðarligu gjøldini eru inni á sjálvavgreiðsluni Mítt Ver.

### 8.3 Ólag á gjaldsavtaluni
Um áfylling (føst, handvirkandi ella sjálvvirkandi) ikki kann gjøgnumførast grundað á viðurskiftir hjá tær, t.d. um gjaldskortið er sperrað ella útgingið, verða boð send á skrásetta teldupostbústaðin og møguliga eisini sum sms-boð.

Í tílíkum førum tilskilar Føroya Tele sær rætt til at krevja eitt ómaksgjald. Føroya Tele sendir kunnandi teldupost til skrásetta teldupostbústaðin, um staðfest verður, at tað ikki ber til at flyta avtalaðu gjøld av tínum gjaldkorti ella umvegis tínari Mínrokning-avtalu.

Um ikki ber til at flyta peningin innan nærri ásett dagatal, kann Føroya Tele læsa fyri haldinum. Haldið kann tá gerast virkið aftur við at rinda eftirstøðuna inni á sjálvavgreiðsluni. Fasta gjaldið fyri Ver-haldið kann bert sigast upp við, at Ver-haldið samstundis verður sagt upp.

Ver-haldið kann sigast upp inni á sjálvgreiðsluni, við at ringja til Føroya Tele ella skriva til kundi@ft.fo.

#### 8.3.1 Uppsøgn av talutíðarhaldum
Verður einki rindað á Ver-haldið í 180 dagar, verður haldið óvirkið, og nummarið fellur aftur til Føroya Tele. Møgulig upphædd verður ikki útgoldin og møgulig skuld verður mótroknað í møguligum innistandandi á Ver-kontuni.

## 9. Mishald og rættarvirknaður
Misheldur annar parturin skyldur sínar í ov stóran mun, hevur hin parturin rætt til at gera nevndu rættarvirknaðir í grein niðan fyri galdandi. Sum dømi um munandi mishald er brot á skyldurnar partanna millum, sum eru tilskilaðar í punkt 4 í Ver-viðskiftatreytunum.

Tá ið Føroya Tele misheldur skyldur sínar í ov stóran mun, hevur tú rætt til at krevja:

a) At brek verður bøtt: Føroya Tele hevur skyldu til beinanvegin at seta tiltøk í verk til tess at bøta brek við tænastuni.

b) Lutfalsligan avsláttur: Tú kanst krevja avsláttur fyri ein lutfalsligan part av haldaragjaldinum fyri ta tíðina, tænastan hevur verið slitin ella munandi órógvað. Hetta er tó bert galdandi, um ólagið hevur verið í minsta lagi tvey samdøgur.

c) Endurgjald: Endurgjaldsábyrgd er eftir vanligum rættarreglum, tó við hesum avmarkingum: Føroya Tele hevur ikki ábyrgd av tapi, sum er orsaka av sliti, órógvi ella broytingum í fjarskiftis- ella tænastukervinum í sambandi við neyðug tiltøk av tøkniligum, viðlíkahaldsligum og rakstrarligum ávum, ella er álagt av Fjarskiftiseftirlitinum.

Undantak er, um Føroya Tele ikki hevur avmarkað avleiðingarnar. Føroya Tele hevur ikki ábyrgd av óbeinleiðis tapi, herundir mistum vinningi, framleiðslutapi, tapi, sum stendst av, at tú missir møguleikan fyri sáttmálagerð við triðjamann, ella at ein sáttmáli dettur burtur ella verður mishildin, uttan so at mishald hjá Føroya Tele er tilætlað.
d) Slit av haldinum: Tú hevur rætt til at krevja haldið slitið, um Føroya Tele misheldur sínar skyldur munandi. Um tú, sum kundi, misheldur tínar skyldur munandi, hevur Føroya Tele rætt til at krevja, at tænastan verður stongd.

1. Tá ið gjaldstreytir verða mishildnar, kann Føroya Tele steingja hald og tilhoyrandi tænastur fyri:

a) Útgangandi samskifti, um tú eitt nú ikki hevur dekning á kontu til rindan av tænastu, hóast áminning er send til skrásetta teldupostbústaðin. Hetta kann gerast 1. dagin eftir gjaldkomudag.

b) Allari nýtslu, um tú eitt nú ikki hevur dekning á kontu til rindan av tænastu, hóast áminning er send til skrásetta teldupostabústaðin. Hetta kann gerast 3. dagin eftir gjaldkomudagin.

Áminning skal greitt boða frá, at stongt verður ein ávísan dag annaðhvørt fyri útgangandi samskifti, inngangandi samskifti ella báðar vegir, um tú ikki innan ávísa freist hevur tryggjað, at gjaldsavtalan er virkin.

Hevur tú ikki tryggjað, at gjaldsavtalan er virkin, kanst tú koma í avmarkaða skuld til Føroya Tele av tí, at áfyllingin hendir, áðrenn keypsupphæddin verður flutt av gjaldskortinum. Tílík skuld skal rindast til Føroya Tele beinanvegin.

Hevur tú ikki tryggjað, at gjaldsavtalan er virkin, hóast áminning er send, kann Føroya Tele steingja ikki bert ta tænastu, sum er mishildin, men allar aðrar tænastur, sum verða veittar tær. Hetta er galdandi, um áminning er send, sum greitt boðar frá, at stongt verður fyri øllum tænastum ein ávísan dag, um tú ikki innan ávísa freist hevur rindað fyri tænastuna.

2. Í øðrum føri, enn tá ið gjaldstreytirnar eru mishildnar:
Misheldur tú munandi skyldur tínar, hevur Føroya Tele rætt til at steingja samskiftið. Áðrenn stongt verður, skalt tú hava skrivliga fráboðan á teldupostbústaðin, og tú skalt hava havt høvi til at gera viðmerkingar um viðurskiftini. Fráboðanin skal upplýsa um orsøkina og áseta neyva freist fyri, nær mishaldið skal vera rættað.

Verður mett neyðugt av trygdarávum fyri fjarskiftiskervið, kann Føroya Tele steingja samskiftið, hóast fráboðan ikki er send frammanundan. Í tílíkum førum boðar Føroya Tele tær frá beint eftir, at stongt verður.

Um stongt verður fyri út- ella inngangandi samskifti, hevur hetta ikki við sær nakran avsláttur í haldaragjaldinum. Føroya Tele letur stongda sambandið uppaftur, tá ið tú hevur rættað mishaldið, herundir goldið fyri tænastuna. Í hesum sambandi hevur Føroya Tele rætt til at krevja eitt eykagjald.

Støddin á eykagjaldinum sæst í listaprísunum hjá Føroya Tele.

3. Slit av haldinum:
Føroya Tele hevur rætt til at slíta haldið, um tú hevur mishildið skyldur tínar munandi. Slitið verður um mánaðarskiftið, tá ið frammanundan goldna haldaragjaldið gongur út.

## 10. Uppsøgn og broytingar

### 10.1 Uppsøgn av avtaluni

Tú kanst siga avtaluna upp í seinasta lagi tann 20. í einum mánað, soleiðis at haldið verður stongt komandi mánaðarskifti. Tó rinda nýggir kundar og talutíðarkundar, ið flyta til størri hald, í minsta lagi fyri verandi mánað umframt mánaðin eftir.

Verður avtala søgd upp, verður møgulig restsalda rindað tær eftir umbøn og móti rindan av ómaksgjaldi; tó ikki tá ið talan er um Ver-talutíðartænastuna. Um haldið skal flytast til annan veitara, tilskilar Føroya Tele sær rætt til at krevja ómaksgjald fyri sítt arbeiði í hesum sambandi.

Uppsøgnin skal sendast sum teldupostur til kundi@ft.fo.

### 10.1.1 Uppsøgn í sambandi við leigan av útgerð

Verður útgerðin ikki latin inn seinast 14 dagar eftir, at leigumálið er uppsagt, verður rokning fyri útgerðina send til kundan. Eftir hetta er útgerðin ogn kundans.

### 10.2 Broyting av haldi

Verður eitt hald uppstigað, fært tú í somu løtu atgongd til innihaldið í nýggja haldinum, og tú rindar í minsta lagi fyri verandi mánað umframt mánaðin eftir, áðrenn haldið kann niðurstigast aftur.

Tá ið tú uppstigar hald ella keypir ískoytistænastu, rindar tú munin upp til næsta haldið ella fult gjald fyri ískoytistænastuna, sama nær í mánaðinum tú fremur broytingina. Verður hald niðurstigað, verður haldið broytt komandi mánaðarskifti.

Tú kanst broyta haldið í sjálvgreiðsluni. Í serligum førum kann Føroya Tele gera broytingina fyri teg. Broytingin skal tá vera okkum í hendi skrivliga í seinasta lagi 3 arbeiðsdagar áðrenn síðsta dag í mánaðanum, fyri at broytingin skal taka við fyri mánaðin eftir.

Um tað av fíggjarligum áðum ella vegna misnýtslu gerst neyðugt fyri Føroya Tele, tilskilar Føroya Tele sær rætt til at áseta hámark fyri nýtslu á hald og tænastur hjá Føroya Tele.
Um tú av misgáum keypir skeivt frá Føroya Tele, hevur tú 14 daga iðranarrætt at fáa hetta broytt, móti at bert møguligur meirkostnaður verður rindaður, og einki brúk hevur verið á. Iðranarrætturin er tó ikki galdandi í mun til talutíðartænastuna.

### 10.3 Rætturin hjá Føroya Tele at siga upp

Undir vanligum umstøðum hevur Føroya Tele ikki rætt til at siga avtaluna upp. Ger Føroya Tele av, sum heild, at gevast við at bjóða ávísa tænastu, kann avtalan sigast upp við 90 daga fráboðan.

### 10.4 Broytingar av avtaluni

Føroya Tele hevur rætt til at gera broytingar í viðskiftatreytunum uttan fráboðan, um broytingin burturav er til frama fyri teg sum kunda. Aðrar broytingar í viðskiftatreytunum hevur Føroya Tele rætt til at fremja við 30 daga fráboðan.

### 10.5 Nummarflyting til annan veitara

Um kundi vil flyta sítt fartelefonhald til annan veitara, skal hann seta teg í samband við nýggja veitaran og biðja um nummarflyting. Føroya Tele avgreiðir nummarflytingina uttan kostnað fyri kunda seinast við arbeiðslok arbeiðsdagin eftir, at nummarflytingin er umbiðin av nýggja

veitaranum.

Nummarflytingin verður framd hóast møguligt bindingartíðarskeið ella uppsagnartíð á verandi fartelefonhaldi. Gev gætur, at tú tó ikki, av hesi orsøk, verður loystur frá møguligum skyldum, sum longu eru avtalaðar í mun til verandi hald. Herundir at rinda fyri eitt møguligt bindingartíðarskeið ella í eini uppsagnartíð.

Um nummarflytingin gongur fyri seg seinni enn lovað omanfyri, ella um feilir henda, ið eru til munandi ampa fyri teg sum kunda, kanst tú seta teg í samband við nýggja veitaran og krevja endurgjald upp á 500 kr. og í serligum førum 1.000 kr.

Krav um endurgjald skal setast fram í seinasta lagi ein mánað eftir hendingina, ið gevur rætt til endurgjaldið. Seinasta freist at útgjalda løggilt endurgjaldskrav er tveir mánaðar eftir móttøku av endurgjaldskravinum.

Nummarflyting verður ikki framd, um serligar umstøður gera seg galdandi, so sum:

- Um tú hevur ógoldna skuld á fartelefonhaldinum, ið er fallin til gjaldingar
- Um haldið frammanundan er ógildað vegna mishald
- Um fartelefonnummarið hoyrir til ein nummarblokk ella aðra størri avtalu

Nummarflyting fyri fartelefonnummar, ið hoyrir til ein nummarblokk, kann tó fremjast, um allur nummarblokkurin undir einum verður fluttur til annan veitara.

## 11. Force majeure

Føroya Tele er leyst av skyldum sínum, um tænasta er slitin ella órógvað orsaka av viðurskiftum, sum Føroya Tele ikki hevur ávirkan á, millum annað, men ikki avmarkað til, toruslàttur, ódnarveður, vatnflóð, eldsbruna, kríggj, verkfall og verkbann, umframt eisini verkfall og verkbann, ið raka starvsfólkini hjá Føroya Tele.

## 12. Trætumál

Stingur trætumál seg upp partanna millum um viðurskifti viðvíkjandi Ver-hald, kanst tú senda Føroya Tele eitt skrivligt mótmæliskriv. Freistin at mótmæla er tríggir mánaðir frá tí degi, tú vart ella átti at verið kunnað/ur við tey viðurskifti, mótmælt verður um.

Føroya Tele tekur undir vanligum umstøðum avgerð í málinum í seinasta lagi tríggjar mánaðar eftir, at mótmælisskrivið er móttikið. Avgerðir hjá Føroya Tele í tílíkum trætumálum kunnu kærast inn fyri Fjarskiftiseftirlitið í teimum førum, har Fjarskiftiseftirlitið hevur heimild at taka avgerðir. Eisini hava partarnir rætt til at leggja málið fyri Føroya Rætt til avgerðar.

## 13. Reiking – nýtsla uttanlands

Fartelefontænastan kann nýtast í teimum londum og hjá útlendskum veitarunum, sum Føroya Tele hevur avtalu við. Føroya Tele kann ikki ábyrgdast fyri dekning, dygd, trygd og útboð av tænastum á teimum útlendsku fjarskiftiskervunum.

Avrokning av reiking kann verða upp í 30 dagar seinkað, og Føroya Tele hevur tá rætt til at trekkja pening av gjaldskortinum, um tøkur peningur ikki er á Ver-kontuni.

Føroya Tele hevur rætt til at krevja nýtslugjald fyri reiking, um tú reikar uttanlands í meira enn 90 dagar út í eitt. Tað merkir, at øll reiking hereftir verður takserað eftir galdandi taksti, um títt

fartelefonhald ikki hevur verið á farnetinum hjá Føroya Tele í Føroyum í einum samanhangandi tíðarskeiði upp á meira enn 90 dagar.

## 14. Gildiskoma

Hesar viðskiftatreytir fáa gildi frá 24. oktober 2023. Møguligar broytingar í Ver-viðskiftatreytunum eftir hesa gildiskomu, eru at finna á heimasíðuni hjá Føroya Tele.